# Føroyskt kebab til akureyringar

**FØROYSKT KEBAB Eftir at hava hugsað seg um væl og leingi gørdi føroyska Rita Didriksen av, at lata upp eina kebabbúð í hjartanum av Akureyri. Nú tveir mánaðr seinni hevur undirtøkan verið munandi betri enn væntað**

Leo Poulsen

Undarligt, sum tilvildin ofta ger seg galdandi.

Vit vórðu innkvarterað einastaðni mitt á gongugøtuni á Akureyri. Luttóku á 6. NEATA-festivalinum, sum í ár varð hildin í høvuðsstaðnum uttan fyri høvuðsstaðin í Íslandi, Akureyri. Beint við síðuna av inngongdini liggur ein kebabbúð, men hóast leiðin ikki gekk inn har at fylla búkin, so fingu vit ríkiligt høvi at heilsa upp á. Tað lagaði seg nevniliga soleiðis, at morgunmaturin varð borðreiddur inni í kebabbúðini.

Vit vóru longu á Akureyri sunnukvøld, og festivalurin skuldi ikki byrja fyrr enn týsdag, so hjá flestu okkara beyðst ikki høvið at heilsa upp á innihavaran fyrr enn mikumorgun.

Og innihavarin – skuldi tað vísa seg – er rótføroysk: Rita Didriksen.

- Ja, sjálvt um eg eri fødd og uppvaksin í Íslandi, so eru bæði foreldrini føroysk, og eg sjálv sostatt eisini, sigur Rita Didriksen.

Hon hevur eisini búð alt sítt lív í Íslandi, men tað hoyrist als ikki á henni.

- Vit tosaðu føroyskt alla tíðina heima, og so vitji eg eisini javnan heima í Føroyum, sigur Rita Didriksen.

Hon er gift á Akureyri og eigur børn, og hennara dagliga starv er skúlalærari.

- Eg undirvísi mest í donskum, men eg havi í longri tíð gingið við tankanum um at lata upp eina kebabbúð á Akureyri, sigur Rita Didriksen.

## Gongur væl

Tað hevur onkur hissini roynd verið gjørd at reka kebabbúð, men tað hevur sum oftast verið skjótt eftir seg.

- Eg haldi, at tað hevur verið ov illa skipa og alt ov tilvildarligt við tilfari og góðsku, sigur Rita Didriksen.

Sjálv hevur hon gjørt avtalu við tveir av stóru leverandørunum av lamba- og svínakjøti og hevur fingið eitt gott samstarv í lag við teir.

- Tað er av stórum týdningi, at hava góðar avtalur og gott samstarv við levarandørarnar. Tú mást lata eina javna og góða vøru, ella fær tú ikki kundarnar, sigur Rita Didriksen.



*Rita Didriksen hevur latið upp kebabbúð á Akureyri, men hon ætlar sær kortini ikki at gevast sum skúlalærari*

Mynd: Leo Poulsen

Hon tók so stigið, tá summarferian hjá skúlunum byrjaði, og hon er rættiliga ovfarin av, hvussu væl tikið er ímóti kebabbúðini.

- Tað hevur gingið yvir allan forvæntning. Nú er gamaní summarfrí og feriutíð, men vit hava havt nógv meira at gjørt, enn eg hevði roknað við, sigur Rita Didriksen.

Og oman á alt hetta fekk hon so morgunmat til tíggjutals fólk aftrat hesar fimm dagarnar NEATA-festivalurin vardi.

- Tað er jú rættiliga undarligt at hugsa sær, at eitt so framkomið land sum Ísland ikki hevur eina kebabbúð á hvørjum horni, men so er ikki, sigur Rita Didriksen.

## Eingin kreppa

Tá tú soleiðis gongur runt í Íslandi er ilt at fáa eyga á, hvar kreppan herjar. Tað koyra framvegis stórir Landrover og Landcruiser runt í gøtunum millum Mercedes og onnur dýr merkir.

Heldur ikki millum manna merkist nøkur kreppa, og tá tú so kemur út í náttarlívið, er einki óført. Har manglar einki av nøkrum slag.

Og Rita Didriksen er púra samd í, at kreppa merkist ikki í landinum.

- Tað er so sera trupult at fáa fólk at arbeiða her hjá mær, og tað sigur mær so mikið sum, at tað neyvan kann kallast kreppa í Íslandi. Eg kann fáa onkur ung at hjálpa mær, men fólk yvir 24 ár eru ikki at uppdríva, sigur Rita Didriksen.

Sjálvt um kebabbúðin gongur sera væl, ætlar hon sær ikki at gevast við at undirvísa í skúlanum kortini.

- Eg havi fingið eina at standa fyri kebabbini, tá eg fari í skúla aftur, men eg komi sjálvandi at hava fingurin á pulsinum og verið her so nógv, sum starvið í skúlanum tilletur, sigur Rita Didriksen.

Um tað so ber til at siga, at hon heldur traditiónina viðlíka, at tað eru innvandrarar, sum lata upp kebabbúðir – tað er so ein onnur søga.

# Nátatíðin nærkast

**NÁTATÍÐ - Eg dugi ikki at siga, hvussu sær út við nátanum nú, men tá vit vóru á Viðareiði í eggjatíðini, tá ógvuliga gott út, sigur Jens-Kjeld Jensen, fuglafrøðingur, í Nólsoy**

Leo Poulsen

Nú byrja menn so smátt at rigga til nátarnar.

Tað hevur verið heldur misjavnt, hvussu nógvir bátar hava drivið nátaveiði seinastu árini, og harvið eisini, hvussu nógv er komið upp á land.

Spurningurin er eisini, hvussu nátin hevur verið fyri seinastu árini. Í fjør var hann heldur seinur á veg, men í ár tóktist hann at verða lagstur til tíðina.

- Vit vóru á Viðareiði 20. mai, og tá sá gott út. Tað var egg undir hvørjari fjøður, so út frá tí skuldi árið gjørst gott til náta. Hinvegin vóru vit á Stóru Dímun herfyri, og tá tóktist ungarnir mær heldur smáir, tó at tað var ilt at meta við slíkari fjarstøðu, sigur Jens-Kjeld Jensen.

Hann sigur, at tað ber als ikki til at tosa um Nólsoynna longur, tá tað kemur til náta.

- Tann tíðin er farin, tá tú kundi stima eystur um og taka tær einar 200 nátar. Generelt ber til at siga, at longur suður tú kemur, verri stendur til við náta, og nú er mest sum knívsskorið í Nólsoy, sigur Jens-Kjeld Jensen.

Stóra orsøkin er, at tað verður skotið so ómetaliga nógv eystan fyri Nólsoynna, og tað órógvar fuglin.

- Umframt áhaldandi dunini frá byrsuskotum, rasa hesir skjóttgangandi bátarnir eisini rundan um oynna, og tað er eisini ógvuliga órógvandi fyri fuglin, sigur Jens-Kjeld Jensen.

## Eingin lundi

Fuglafrøðingurin heldur, at ferðafólk kunnu ikki fáa nógv burtur úr einum slíkum túri, har speedað verður framvið, drittað inn í gjáir og holur, fyri síðani at verða aftur í Havn lítlan tíma seinni.

- Slíkt órógvar alt fuglalív, ikki bert nátan, sigur Jens-Kjeld Jensen.

Men stendur illa til við nátanum, so er nógv verri statt við lundanum.

- Tað hevur eingin fulgur verið at sæð nakrastaðni í ár. Eg veit um ferðafólk, sum fóru út í Mykines um miðjan juli at avmynda lunda, men tey komu aftur sum av torvheiðum. Tey sóu einans lunda í allari oynni, og hann ver enntá ov langt burturi at avmynda, sigur Jens-Kjeld Jensen.

Hann heldur, at tað man vera serdømi, at fara út í Mykines miðjan juli, og tað er so oyði við lunda.




Mynd: Vilmund Jacobsen

*Kanska fer nátatíðin at hyldnast hjá monnum í ár*

- Men skilið er tað sama allastaðni. Bæði í Stóru Dímun og Lítlu Dímun er sama skilið, og á Viðareiði og í Skúvoy hava teir heldur ikki bjóða til. 40 lundar er tað mesta, eg havi hoyrt um, at menn hava fingið ein dag, og tað sigur alt, sigur Jens-Kjeld Jensen.

Í Nólsoy hevur ikki verið fleygað trý tey seinastu árini. Urðin fór ógvuliga illa í ódnarveðrinum í januar mánað fyri trimum árum síðani, tá fleiri sessir skolaðu burtur í briminum. Síðani hevur ikki verið fleygað í gomlu Urðini.

Eisini í Tindhólmi hava teir bundið um heilan fingur og friðað hólman fyri lundafleygi.

Kanska nátatíðin verður ikki so galin í ár aftur fyri.

- Tað sá í hvussu er gott út í mai, sigur Jens-Kjeld Jensen.